# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2013

| | |
|---|---|
| **Fundur nr. 6**<br>**Tíð:** 17. juni 2013 kl. 19.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | **Skrivari:** Pól Thorsteinsson |

| **Fastir fundardagar:** | **Møttir:** | **Ikki á Fundi:** |
|---|---|---|
| 14. januar, 11. februar, 14. mars, 15. apríl, 30. mai, 17. juni, 19. august, 23. september, 28. oktober, 25. november, 19. desember | Allir býráðslimir uttan Sirið Stenberg | Sirið Stenberg, fráboðað |

**1) Mál nr.: 13/00064** Søla av ognini á matr. nr. 611h

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram mál um, at selja ognina har kommunulæknin hevur búð. Allir eigarir vóru samdir um, at ognin kundi lýsast alment til sølu. Vágs kommuna eigur ognina saman við Hovi, Porkeri og Sumba.

**Avgerð:**
Samtykt við 8 atkvøðum fyri, at húsini ikki verða seld í hesum umfarinum.

**2) Mál nr.: 13/00116** Eykajáttan til Ung í arbeiði 2013, seinna viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til seinnu viðgerð eykajáttan til Ung í arbeiði. Eykajáttanin á kr. 120.000 av innistandandi var samtykt við fyrru viðgerð á býráðsfundi tann 15.04.2013.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at játta kr. 120.000 av innistandandi.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 13/00120** Møguligt keyp av matr. nr. 170a á havnarlagnum

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram mál viðvíkjandi einum møguligum keypið av døkinum undir gomlu oljutangunum hjá Effo, á havnarlagnum. Effo hevur bjóðað kommununi, at keypa øki, eftir at Effo hevur tikið tangarnir niður, og ruddað øki annars, soleiðis at ongin vandi er fyri oljudálking o.s.fr.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at keypa øki frá Effo.

**4) Mál nr.: 13/00167** Stuðul til Vágs Sóknar Bygdasavn

**Frágreiðing um mál:**
Varaborgarstjórin leggur fram umsókn um stuðul á kr. 72.000. Mentanar- og Fíggjarnevndin hava mælt til, at játtað stuðulin. Dennis Holm fór av fundinum tí hann metti seg ógegnigan. Eydis Kjærbo leiddi síðani fundin undir hes~~in~~ málinum.
UM

**Avgerð:**
Samtykt við 7 atkvøðum fyri, at játtað kr. 72.000 í stuðuli.

**5) Mál nr.: 13/00170** Eykajáttan til stuðul til rentuútreiðslur, fyrra viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram mál frá Fíggjarnevndini um eykajáttan fyri 2013 í samband við stuðul til rentuútreiðslur. Løgtingið broytti býtið av útreiðslunum í desember 2012, og harvið hækkaði parturin hjá øllum kommununum. Broytingin í lógini kom aftaná, at fíggjarætlanin hjá kommununi var endaliga samtykt. Fíggjarnevndin mælir til, at játtað kr. 200.000 av innistandandi til hetta.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at játtað kr. 200.000 av innistandandi.

Undirskriva:

**6) Mál nr.: 13/00178** Umsókn um samanlegging av matr. nr. 249a og 249b

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram mál um samanlegging av tveimum matr. nr. Tekniska nevnd mælir til, at játtað samanleggingina.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at taka undir við Teknisku nevnd.

**Kunning/umrøðu:**
- Borgarstjórin kunnar um svar frá Fíggjarmálaráðnum viðvíkjandi møguligari umlegging av lániskuldini.
- Borgarstjórin kunnar um ætlaða kommunufelagsskapin í Suðuroy.
- Borgarstjórin kunnar um ætlanina, at leggja eldraøki til kommunurnar tann 1. januar 2014.

Undirskriva: